


www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 09 - 2012

# Hallur og Johan í essinum í Stavanger

Føroyar vóru av álvara í miðdeplinum á Bryggjuni í Stavanger, tá altjóða oljumessa varð í býnum herfyri. Umframt føroyska básin á oljumessuni skipaðu Tórshavnar og Runavíkar kommunur fyri mentanarligum tiltaki á Bryggjuni. Sluppin Westward Ho varð komin til tiltakið, og á landi varð básur, sum bjóðaði gestunum føroyskan tónleik og annað gott. Fleiri føroyskir tónleikarar vóru við til tiltakið, og tá onkur teirra fekk hvíld eina løtu, tók landsstýrismaðurin í oljumálum yvir  við guittara í hond gav hann føroyska country konganum, Halli Joensen úr Klaksvík, eina hjálpandi hond. Sí myndirnar frá hugnaliga tiltakinum á Bryggjuni í Stavanger, har eisini varð borðreitt við føroyskum viðskera til innboðin. Tit finna myndafrásøgnina á hesi síðuni ella á forsíðuni á portal.fo. Mynd -  Hallur og Johan undirhalda í Stavanger. Myndatøka oljan.fo/Jan Müller